*Kanningar vísa, at 20-40 prosent av øllum donskum skúlabørnum ganga í skúla á tómum maga*
Frede Breuner, kostráðgevi í Danmark

*maturin til allar skúlarnar í høvuðsstaðnum kann jú gerast í felag við t.d. tann matin, sum hvønn dag allíkavæl verður gjørdur til tey gomlu*
Jenny Lydersen, Mentamálaráðið

*Serliga í eldru flokkunum eru fleiri, sum ikki eta matpakka, men heldur keypa sær eitthvørt ósunt ístaðin. Tað er tað sama rákið, sum útlendskar kanningar eisini vísa*
Jenny Lydersen, Mentamálaráðið

# m maga



*Matvanarnir hjá næmingunum í fólkskúlanum eru ov vánaligir, og hetta gongur útyvir innlæring og bindindi. Tey orka snøgt sagt ikki at fylgja við. Tí ger danska stjórnin nú eina roynd at geva næmingum heitan og heilsugóðan mat á døgverða.*
Mynd: Jens Kr. Vang



*Tá nýggir skúlar verða bygdir –sum her við Løgmannabreyt í Hoyvíktilmælir mentamálaráðið, at kantina er við í ætlanini. Jenny Lydersen á mentamálaráðnum heldur, at tá matskipanir á skúlunum bera til aðrastaðni, so eiga tær eisini at kunna fáast í lag her.*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Heitan mat til føroysk børn

**- Tá tey fáa tað at rigga aðrastaðni, dugi eg ikki at síggja, hví matskipanir ikki eisini skulu fungera her hjá okkum, sigur Jenny Lydersen á mentamálaráðnum**

- Ì mentamálaráðnum eru vit fullgreið yvir, hvussu stórur týdningurin av heilsugóðum mati er fyri innlæringina hjá børnunum, staðfestir Jenny Lydersen, ið arbeiðir á fólkaskúladeildini á mentamálaráðnum.

Og okkurt átak hevur verið gjørt, fyri at venja børnini við av við alt søtmeti, og heldur læra tey betri matvanar. Í fjør gjørdi almanna-og heilsumálaráðið eina roynd at geva næmingunum eina frukt um dagin, og tann skipanin riggaði sera væl, og allir partar tóktust nøgdir við hana.

Jenny Lydersen sigur, at vónin var, at kommunurnar fóru at yvirtaka skipanina, men hon vísti seg at detta niðurfyri mestsum allastaðni í landinum. Tað hevði tó verið eitt stig á leiðini til betri matvanar, heldur Jenny.

- Men tá tað kemur til heitan mat hvønn dag, er avmarkað, hvat vit kunnu krevja av skúlunum. Flestu skúlarnir húsast jú í gomlum bygningum, og teir hava als ikki umstøður til at byggja kantinu, vísir Jenny á.

## Svøríki fyrimyndin

Jenny Lydersen hevur júst verið í Svøríki, har øll skúlabørn fáa heitan mat dagliga.

- Har ganga matskipaninar heilt ótrúliga væl, og man merkir beinanvegin, tá man kemur inn í skúlarnar har, at tað er nógv róligari og betri trivnaður inni á skúlunum. Kostnaðurin av matinum verður tikin av skattapengunum, og hetta er avgjørt ein skipan, sum kann fáast at rigga her. Í Havnini eru nógv flestir næmingar, og maturin til allar skúlarnar í høvuðsstaðnum kann jú gerast í felag við t.d. tann matin, sum hvønn dag allíkavæl verður gjørdur til tey gomlu. So á tann hátt nýtist tað ikki at verða ein dýr framleiðsla, sigur Jenny Lydersen.

Hon sigur víðari, at tað nú eru nøkur ár liðin síðani, at døgverðatímin varð tikin burtur, men enn er eingin haldgóð loysn sett í staðin.

- Børnini eta matpakka, og tað er tað. Men ein kanning, sum fyribyrgingarráðið hevur gjørt, vísir, at tað tíbetur eru sera nógv av føroysku børnunum hava matpakka við. Kanska fleiri enn man kundi hildið frammanundan. So foreldrini taka hond um børnini, tað má man siga, sigur Jenny.

Hon vísir tó á, at serliga í eldru flokkunum eru fleiri, sum ikki eta matpakka, men heldur keypa sær eitthvørt ósunt ístaðin.

-Tað er tað sama rákið, sum útlendskar kanningar eisini vísa, og tí hevði tað avgjørt verið besta loysnin, um allir næmingar kundu fingið heilsugóðan og heitan mat á døgverða, vísir Jenny Lydersen á.

Hon sigur, at tað ikki er alneyðugt fyri skúlarnar at hava eina stóra kantinu, tí flokkarnir saktans kunnu skiftast um at eta.

- Á smærri skúlunum í Svøríki verður tað skipað soleiðis, at næmingarnir verða býttir upp í 4 ella 5 bólkar, og so nýta teir matarhølið eftir tørni. Øll børnini hava 20 minuttir at eta í, taka upp eftir sær, og geva so pláss fyri næsta bólkinum. Tað riggar eisini væl, tí eingin sigur, at øll skulu eta í senn, greiðir Jenny Lydersen frá.

## Nýggir skúlar betri fyri

Jenny sigur, at hóast ringt er at fáast við gomlu skúlarnar, so royna tey at gera sína ávirkan galdandi, tá nýbyggingar eru í gongd.

- T.d. verða tveir nýggir skúlar bygdir í løtuni. Ein skúli verður bygdur uppi á Løgmannabreyt og ein inni í Runavík, og í báðum førum er hædd tikin fyri matarstaði til næmingarnar. So hetta er nakað vit avgjørt eru tilvitað um. Tíbetur hava allar útlendsku kanningarnar um samanhangin ímillum góðan mat og góða skúlagongd eisini rinið við her heima hjá okkum, sigur Jenny Lydersen at enda.

## Svøríki

Í Svøríki hevur siðvenjan í mong ár verið at bjóða øllum børnum úr fyrsta í níggjunda flokk ókeypis mat í skúlunum. Skipanin umfatar eisini næmingar í miðnámsskúlum.

Nógvar kanningar vórðu gjørdar í kreppuni í 90'unum, og niðurstøðan av teimum var, at góður kostur til børn og ung hevur stóra ávirkan á heilsuna, vælveruna og avrikið í skúlanum. Í 1998 var rætturin til skúlamat staðfestur í skúlalógini.

## Ísland

Í Íslandi hevur nógv kjak verið um tørvin á matarskipanum. Í økjum har børnini hava langan veg til skúla, er vanligt, at tey kunnu keypa sær eina máltíð í skúlanum, meðan børnini á bygd fara heim at eta døgverða. Í miðstaðarøkinum er vanligt, at børnini keypa sær eina máltíð fyri uml 10 krónur, umframt at tað leingi hevur verið gjørligt hjá íslendskum børnum at keypa sær m.a. mjólk, breyð og jogurt. Mjólkarskipanir eru vanligar í Íslandi.

Kelda
Skúlablaðið nr. 3, 2003